# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØKR
JAKUP@SOSIALURIN.FO

*– Tað er okkara áskoðan, at báðar hendingarnar hava sera avgerandi ávirkan á dystin, og tí hava vit kært«*

*Sunneva Jacobsen, forkvinna í H71*

# H71 vil hava nýggjan dyst



*H71 vil hava nýggjan dyst móti Neistanum. Tvey mistøk frá dómara og dómaraborði høvdu avgerandi ávirkan á úrslitið, vilja tey í felagnum vera við*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Tvær hendingar kring dømingina av dystinum millum Neistan og H71 hava við sær, at hoyvíkingar nú vilja hava nýggjan dyst**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við einum máli í seinasta sekundinum vann Neistin dystin móti H71 seinasta sunnudag. Tann dysturin gav tvey harðliga tiltrongd stig, soleiðis at Neistin nú framhaldandi er við í finalustríðnum, meðan hoyvíkingar søgdu endaliga farvæl til sama stríð.

Men tað er nú kanska ikki heilt so vist kortini. Hoyvíkingar hava nevnliga kært tvær hendingar undir dystinum, og kravið frá teimum er, at felagið fær nýggjan dyst.

– Í fyrra lagi snýr tað seg um eina hending í seinna hálvleiki. Neistin er í álopi, men missir bóltin. Okkara menn fara í skjótálop, men tá ýlir klokkan hjá dómaraborðinum. Hetta tí eitt harpiks-lok var á vøllinum, og dómaraborðið vildi hava hetta burtur.

– Her halda vit tað var skeivt av dómaraborðinum at steðga dystinum, tí hatta lokið hevði onga ávirkan á trygdina hjá spælarunum ella á dystin. Hartil er tað okkara fatan, at dómararnir áttu at byrja dystin við brotskasti til okkara menn, sum jú mistu ein upplagdan málmøguleika, sigur Sunneva Jacobsen, forkvinna í H71.

Hartil hevur H71 kært hendingina, tá Neistin skoraði seinasta málið.

– Tá dómararnir markera fyri, at tíðin skal steðgast, vísir klokkan 29.59, men tá fríkastið skal takast, hevur Neistin fingið eitt sekund eyka. Hetta hevur sera avgerandi ávirkan á dystin, og vit duga ikki at síggja, hví hetta varð gjørt.

– Tað er okkara áskoðan, at báðar hendingarnar hava sera avgerandi ávirkan á dystin, og tí hava vit kært, sigur Sunneva.

Kæran varð send Hondbóltssambandinum seinnapartin í gjár, og nú verður tað so upp til Kappingarnevndina at gera, hvat víðari skal henda í málinum.

## Altjóða dómarar til mansfinaluna

Dómaraásetingarnar til steypafinalurnar í hondbólti eru nú greiðar.

Eins og í fjør, so verða tað teir báðir altjóða dómararnir hjá Føroyum, Andreas F. Hansen og Eyðun L. Samuelsen, sum skulu døma mansfinaluna. Tann dysturin verður í ár millum VÍF og StÍF.

Hjá kvinnunum skulu Stjørnan og VB dystast, og her verða tað Ragnar Simonsen og Rúni Mohr Gunnarsson, sum døma dystin. Hetta er fyrsta ferðin, at teir báðir døma finaludyst.

**-mørk**

---

## Meinhardt skal venja NSÍ

Nú er tað greitt, hvør skal hava ábyrgdina av næstbesta NSÍ liðnum. Týsdagin varð kunngjørt, at Meinhardt Dalbúð, sum býr í Runavík, skal hava ábyrgdina av NSÍ liðnum í 1. deild. Liðið flutti síðsta kappingarár upp í næstbestu deildina.

Takið hjá Meinhardti verður í góðum samstarvi við venjaran hjá Formula liðnum, Johan Nielsen, og hjálparvenjara hansara, Paula Poulsen, at menna spælararnar og at syrgja fyri, at liðið varðveitir plássið í næstbestu deildini.

Meinhardt hevur drúgvar venjararoyndir. Umframt at hava vant fleiri av yngru deildunum í NSÍ, hevur hann verið venjari á Skála, í Leirvík og í Fuglafirði, har hann í tvey ár vandi ÍF, sum tá var í bestu deildini.

**-mørk**

# Dómarans meting er avgerandi

**Dómararnir í dystinum millum Neistin og H71 halda seg vera ósekar í kærumálinum, og tí vinnur kæran frá H71 neyvan frama**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

– Tað er keðiligt, at tað verður trýst á klokkuna, tí eg dugi ikki at síggja, at spælið verður ávirkað av hasum lokinum. Og eyka keðiligt verður tað, tá annað liðið í somu løtu fer í skjótálop. Soleiðis sigur Uni Wardum, sum saman við beiggjanum. Hannis, dømdi dystin millum Neistan og H71.

Um spurningin, hvørt H71 skuldi fingið brotskast eftir ta hendingina, sigur Uni, at tað altíð er ein metingarspurningur.

– Missir eitt lið ein upplagdan málmøguleika, so skal brotskast dømast. Í hasum ítøkiliga málinum vóru vit ikki heilt vísir í, hvussu upplagdur møguleikin var, og tí valdu vit at byrja við fríkasti ístaðin, sigur Uni.

Hendingina kring seinasta fríkastið er Uni hinvegin púra ivaleysur í. Tá vit steðga tíðini, vísir okkara klokka, at tvey sekund eru eftir. Og tað er altíð klokkan hjá dómarunum sjálvum, sum er tann rætta, sigur Uni.

### Metingin avgerandi

Út frá hesum ber illa til at ímynda sær, at Kappingarnevndin hjá HSF fer at geva H71 viðhald í síni kæru.

Ein av grundreglunum innan kæruviðgerð innan ítróttin er, at dómarans meting ikki kann broytast. Tann spurningurin hevur verið viðgjørdur av bæði Kappingar- og dómsnevndum hjá ymsu sersambondunum, og hvørja ferð hevur niðurstøðan verið tann sama. Vísandi til reglugerð fyri dómsnevndir innan ÍSF verður víst á, at ein dómsnevnd ikki hevur heimild at broyta meting dómarans í kapping.

Bæði førini, sum kæran frá H71 umrøður, snúgva seg júst um dómarans meting, og tí er illa hugsandi, at kæran frá H71 verður gingin á møti. Í øllum førum ikki av Kappingar- ella Dómsnevnd.